# Mugu fyri alt varðveita Føroya Fiskaaling

**Almenn uppílegging valdast, metir Henrik Old. Hann er av tí áskoðan, at almennur peningur til alivinnuna ikki kann samanberast við almennan pening til rækjuvinnan, sum eisini er í trongum skóm**

KREPPUHJÁLP TIL ALIVINNUNA
*Páll Holm Johannesen*

Tá vit spyrja Henrik Old, formann í Vinnunevndini, um møguleikan, at almennir pengar skulu í alivinnuna, svarar hann, at tað er sera vandamikið.

– Eg var sjálvur við í føroyskum politikki í 80 árunum, tá stuðulspolitikkurin var í hæddini, og eg má siga fyri meg, at eg eri ikki fyri, at vit venda aftur til at stuðla fiskivinnuni, sigur formaðurin í vinnunevndini.

Henrik Old vísir á stóra týdningin, at um kreppan í alivinnuni verður so álvarsom, at øll alivinnan fer av knóranum, so er avgerandi frá almennari síðu at halda fast um Føroya Fiskaaling, sum er grundarlagið fyri allari aling í Føroyum.

– Føroya Fiskaaling hevur gjørt eitt risaarbeiði mongu tey síðstu árini, og felagið er grundarlagið undir alivinnuni í Føroyum. Verður so illa statt, at øll alivinnan fer á heysin, so mugu vit gera alt fyri at varðveita Fiskaaling, tí felagið er sjálvt grundarlagið fyri, at ein alivinna aftur kann fáast upp á føtur í Føroyum, greiðir Henrik Old frá.

### Almenn uppílegging valdast

Hóast javnaðartingmaðurin er heldur ivingarsamur við tankanum, um tað almenna skal fara inn í alivinnuna, so vísir hann á, at almenn uppílegging valdast. Síðan ræðusøgurnar frá stóru búskaparkreppuni fyrst í nítárunum hava føroysku fíggjarstovnarnir harðliga viðmælt, at tað almenna ikki blandar seg í privata virksemið.

– Tað tykist umvent á meg, at vit nú hoyra peningarstovnar rópa um hjálp frá tí almenna, tá teir hvassliga hava víst øllum almennum uppíleggingum aftur. At teir nú rópa um hjálp er helst greið tekin, um teir hava misti tamarhaldið á støðuni, og vita ikki síni livandi ráð, sigur Henrik Old.

Formaðurin í Vinnunevndini er tó ikki ímóti almennnari uppílegging á øllum økjum. Hann sigur, at neyðugt er taka støðu frá máli til máls. Tá vit nevna møguleikan fyri honum, um kreppurnar í rækjuflotanum og alivinnuni kunnu samanberast, svarar Henrik, at tað eru tvey fullkomiliga ymisk viðurskifti, vit tosa um.

– Í alivinnuni fara firðirnar, sum eru grundarlagið undir vinnuni, ongan veg. Er tað ikki er grundarlig fyri at halda fram, so mugu alibrúkini fara á heysin, so aðrir kunnu fáa møguleikan at halda fram við virkseminum. Í rækjuflotanum er stóri trupulleikin, at stórar íløgur eru gjørdar í stór og stásilig skip, og fara hesi av knóranum, so er stórur partur av grundarlagnum fyri vinnuni tikin undan, greiðir Henrik Old frá.

Suðuroyartingmaðurin metir eisini, at verður ein almenn uppílegging í alivinnuni veruleiki, so hevur hann ilt við at síggja, hvussu tað almenna skal meta, hvørjir partar av alivinnuni skulu varðveitast og hvørjir skulu fara av knóranum.

Henrik Old sigur at enda, at tað er nærmast ein ógjørlig uppgáva at taka dagar millum, hvørji virki hava uppiborið at halda fram og hvørji ikki, og tað verður ikki minst ein hørð politisk togtogan.



*Formaðurin í Vinnunevndini, Henrik Old, er heldur ivingarsamur við tankanum, um at tað almenna skal veita alivinnuni eitt kapitalinnskot. -Eg var sjálvur við í føroyskum politikki í 80 árunum, tá stuðulspolitikkurin var í hæddini, og eg má siga fyri meg, at eg eri ikki fyri, at vit venda aftur til at stuðla fiskivinnuni, sigur formaðurin í vinnunevndini*

Kristina Háfoss:

# – Ótrúligt tað verður umhugsað

**Tjóðveldistingkvinnan metir, tað verða av stórum týdningi, at tað almenna ikki fer í alivinnuna, tí so er stórur vandi fyri, at aðrar vinnugreinar eisini fær ynskja stuðul, og tá er lætt at enda í somu støðu sum í 80 árunum**

KREPPUHJÁLP TIL ALIVINNUNA
*Páll Holm Johannesen*

Kristina Háfoss hevði í týsdagssosialinum eina viðmerking, um torføru støðuna, føroysku peningastovnarnir eru í, orsaka av stóru kreppuni í alivinnuni. Tjóðveldistingkvinnan vísir millum annað á, at peningastovnarnir sjálvir mugu taka ábyrgd yvir tann váða, teir hava tikið í alivinnuni.

Hon heldur, tað er undrunarvert, at føroysku peningastovnarnir nú tosa um, at alivinnan tørvar almennan pening, tá teir síðstu mongu árini júst hava ávarað ímóti, at tað almenna blandar seg ov nógv í privat virksemi.

- Tað er ótrúligt, at tað yvirhøvur verður umhugsað, at tað almenna skal veita alivinnuni pening, eftir allar ræðusøgurnar frá 80 árunum. Ræðusøgurnar hava ikki meir enn lagt seg, so tosa vit aftur um at endurtaka somu mistøkini, sigur Kristina Háfoss.

Tá vit spyrja hana um, hvat hon heldur um sjónarmiðini hjá løgmanni og Bjarna Djurholm, um at tað almenna møguliga skal hjálpa alivinnuna, svarar tjóðveldistingkvinnan, at hon enn ikki hevur havt møguleika at umrøða málið við løgmann, og tískil kann hon ikki gera nakra viðmerking til úttalilsini hjá fólkafloksmonnunum

### Greiðan skilna

Kristina Háfoss er rættiliga avgjørd í sínum máli viðvíkjandi spurninginum um almennan pening í alivinnuni. Hon metir tað verða av stórum týdningi, at tað er greiður skilnaður millum privata og almenna geiran. Uttan greiðan skilna ber ikki til at hava eitt greitt ábyrgdarbýti, sigur Kristina Háfoss.

- Váðin skal verða hjá vinnulívinum, meðan tað almenna skal veita vælferðartænastur og karmar fyri vinnulívið. Verða tað almenna og privata samantvinnað aftur, er stórur vandi fyri, at tað verður føroyski skattgjaldarin sum í síðsta enda má bera kostnaðin, greiðir Kristina Háfoss frá.

*Tjóðveldistingkvinnan, Kristina Háfoss, er rættiliga avgjørd í sínum máli viðvíkjandi almennum pengum til alivinnuna. Váðin skal verða hjá vinnulívinum, meðan tað almenna skal veita vælferðartænastur og karmar fyri vinnulívið, sigur Kristina Háfoss.*



### Mugu ansa okkum

- Vit kunnu ikki bara siga ja til almennar pengar til alivinnuna, og so vænta, at aðrar vinnugreinir ikki fara at gera sær dælt av sama møguleika. Tað hevur bæði verið nevnt at veita Smyril Line og rækjuflotanum almennar pengar, og opna vit fyrst fyri møguleikanum, so er stórur vandi fyri, at vit lættliga kunnu enda í somu ræðustøðu sum 80 árunum, og tí mugu vit ansa okkum sigur Kristina Háfoss at enda.



## NØVN Í VIKUNI

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Dagmar Joensen, formaður í Framtaksgrunninum:

# – Einki at taka støðu til



*Hóast stjórarnir í bæði Føroya Banka og Føroya Sparikassa hava víst á møguleikan, at Framtaksgrunnurin gevur alivinnuni eitt kapitalinnskot, so metir formaðurin í grunninum ikki, at nakað ítøkiligt er at taka støðu til.*

KREPPUHJÁLP TIL ALIVINNUNA
*Páll Holm Johannesen*

Í farnu viku nevndu báðir stjórarnir í ávíkavist Føroya Banka og Føroya Sparikassa møguleikan, at tað almenna gjøgnum Framtaksgrunnin fór inn í alivinnuni, og veitti vinnuni eitt kapitalinnskot.

Framtaksgrunnurin hevur í dag stóran part av sínum peningi í fiskivinnuni. Grunnurin bjargaði upprunaliga bæði Føroya Fiskavirking og Fiskasøluna frá at fara á húsagang. Hóast báðir peningastovnarnir hava víst á møguleikan hjá alivinnuni at fáa hjálp frá Framtaksgrunninum, sigur formaðurin, Dagmar Joensen, at enn er einki ítøkiligt at taka støðu til.

– Vit fylgja sjálvsagt hvat verður ført fram í bløðunum um kreppuna í alivinnuni, men so leingi vit ikki hava fingið nakað ítøkiligt á borðið, so er einki at taka støðu til, sigur Dagmar Joensen.



### Arni Kjærbo 85 ár

Tann 14. juli fylti Arni Kjærbo, búsitandi í Havn, 85 ár. Arni er suðuroyingur, føddur og uppvaksin í Sumba. Hann er sonur Kristionnu, f. Jacobsen av Glyvrum, og Tummas Jákup Kjærbo úr Sumba. Arni er best kendur sum "Arni í Smæruni", har hann arbeiddi út móti fjórðingsøld, og gavst hann har, stutt áðrenn Smæran endaliga lat aftur. Smæran var sum kunnugt ein av stóru handlunum í Havn, og kom Arni, sum tann fryntligi og dugnaligi maður hann er, gjøgnum sítt arbeiði at gerast væl kendur millum manna.

Sum blaðungur, bert 14 ára gamal, fór Arni til skips, og sigldi hann í nógv ár við ymiskum skipum. Seinni tók hann við eftir pápa sín og fór at reka handil í Sumba. Aftaná at Arni gavst við egna handilsvirksemi sínum, tóku brøðurnir eftir, fyrst Viggo og seinni Leivur. Arni giftist við Elsu Sofíu, f. Joensen, úr Sumba, sum doyði í 1961 bert 46 ára gomul. Stutt eftir flutti Arni til Havnar saman við dóttrini Marin Kristinu. Í 1965 giftist Arni við Sofíu, f. Olsen, úr Vestmanna og fingu tey børnini Jákup Eyðfinn og Elin. Arni er hegnismaður, og eru tað ikki so fá dømir um hetta. Hann hevur í frítíðini bygt síni egnu hús, fyrst í Sumba og síðan í Janstovugøtu í Havn. Har umframt var hann við til at byggja fleiri onnur sethús. Tað er tí natúrligt, at hann eitt tíðarskeið arbeiddi innan byggiídnaðin, og var tað hjá byggifelagnum Peturi í Gong í Havn.

### Mary í Garði stjóri fyri Serstovnaøkið og Heimarøktina

Almannamálaráðið hevur sett Mary J. í Garði í starvið sum stjóri fyri Heimarøktina og Serforsorgina. Hon tekur við starvinum 1. august 2003. Mary er útbúgvin sjúkrasystir í 1985 og siviløkonomur í 1993. Harumframt hevur hon leiðsluútbúgvingina KIOL frá DFH. Hon hevur hollar royndir innan leiðslu, fyrisiting og fíggjarstýring innan almanna- og heilsuøkið. Hon hevur starvast innan sjúkrahúsverkið í fleiri ár, í Almanna- og Heilsumálastýrinum var hon deildarstjóri í nærum trý ár og er í løtuni í starvi í Fiskimálaráðnum. Mary er gift við Bergur í Garði, postverksstjóra, tey eiga børnini Cristian og Mariu



## Róland Waag Høgnesen deyður



Leygardagin 12. juli andaðist Róland Waag Høgnesen, 75 ára gamal. Hann var klaksvíkingur, sonur Turid Waag úr Vági, Klaksvík, og Jóan Magnus Høgnesen, av Toftanesi í Lorvík. Barnaárini var Róland nógv í Mikladali, og hann vitjaði seinni javnan í Mikladali og stundum eisini á Trøllanesi.

Róland tók realprógv í Klaksvík og síðani studentsprógv í Havn í 1948. Hann fór til Keypmannahavnar at lesa og gjørdist í 1971 cand.mag. í søgu og kristni.

Hann búði í Danmark, síðani hann fór niður at lesa. Eftir lokna útbúgving hevði hann ymisk størv, ma. var hann í fimtan ár hjá Det Udenrigspolitiske Selskab. Hansara áhugi fyri og kunnleiki til alheims politikk gjørdu, at hann av og á hevði fyrilestrar í danska útvarpinum og kronikkir í donskum bløðum um uttanríkispolitikk.

Hann starvaðist á Gladsaxe Gymnasium 1969-71 og á Gl. Hellerup Gymnasium 1971-1994, har hann undirvísti í søgu, kristni og fornaldarfrøði. Eitt skifti var hann lestrarvegleiðari og í 7 ár valdur álitismaður fyri starvsfelagarnar. Hann var ofta próvdómari til studenta- og HF-próvtøkur í Føroyum, bæði í skriftligum og munnligum. Hann var eisini vegleiðari á námsfrøðiskeiðum og undirvísti á eftirútbúgvingarskeiðum.

Mangir føroyskir lesandi munna minnast Róland og hansara ídni fyri virkseminum í Studentafelagnum, har hann var formaður 1952-54. Haraftrat var hann formaður í Mentunargrunni Studentafelagsins 1957-68. Í hansara formanstíð kom m.a. bóklingurin Heimastýri-Sjálvstýri. Hann var nevndarlimur í Meginfelag Føroyskra Studenta í mong ár.

Á ungum árum gjørdist Róland sjálvstýrismaður, og hann styðjaði Sjálvstýrisflokkin alla sína ævi. Í Danmark valdi hann Det Radikale Venstre, og í 14 ár var hann formaður í felagnum hjá Teimum Radikalu í Herlev, har hann búði. Hann varð stillaður upp nakrar ferðir til kommunuval og eina ferð til amtsráðsval.

Róland hevur skrivað nógvar greinar í føroyskum bløðum og hildið fyrilestrar í Útvarpinum, mest um søgulig evni. Hann skrivaði eisini ummæli. Tey seinastu árini skrivaði hann nógvar greinar um viðurskiftini millum Danmark og Føroyar

Í 1951 giftist Róland við Ebbu Holm Nielsen úr Karise. Hon var fødd í 1927 og doyði í 1998. Tey fingu døturnar Turid, Sonju og Eydnu, sum býr í Føroyum.

### Dagurin

**16. juli. Súsanna.** Í apokrýfisku bókunum verður sagt frá, at Súsanna, kona Jójakims í Bábel, varð løgd undir ótrúskap, men varð bjargað av profetinum Dánjali. Súsonnuvísa varð kvøðin í brúðardansi í Føroyum. Navnið er hebráiskt og merkir lilja.